UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

20/00558

# Reglugerð
# fyri
# veiting av stuðulsjáttan til føroysk seyðaskinn

## Endamál

**§ 1.** Endamálið er at tryggja, at føroysk seyðaskinn koma til høldar.

## Stuðulstreytir

**§ 2.** Stuðul kann latast einstaklingum, virkjum og feløgum, sum eru bókhaldsskyldug og mvg-skrásett.
*Stk.2.* Stuðul verður latin til djóralæknakanningar í sambandi við, at skinn skulu flytast av landinum at garva.
*Stk. 3.* Stuðul verður latin til flutning til og úr Føroyum, tá seyðaskinn verða flutt úr Føroyum at garva.

## Umsókn

**§ 3.** Búnaðarstovan umsitur stuðulsjáttanina.
*Stk. 2.* Umsóknir skulu skrivast á oyðublaðið *Umsóknarblað til stuðul av játtanini til føroysk seyðaskinn*, sum er tøkt á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni *www.bst.fo*. Oyðublaðið fæst eisini frá Búnaðarstovuni.
*Stk. 3.* Umsóknarfreistin er 1. november í inniverandi játtanarári.

## Játtan

**§ 4.** Stuðul verður latin, um játtan er til taks á fíggjarlógini, konta 6.33.2.15.
*Stk. 2.* Stuðul verður játtaður umsøkjarum í lutfalli til samlaða talið av skinnum, ið søkt verður um stuðul til.

## Útgjald av stuðuli

**§ 5.** Stuðulin verður útgoldin, tá Búnaðarstovan hevur fingið grannskoðaðan roknskap fyri hildnar útreiðslur, ið eru farnar til endamálið.

## Roknskapur og grannskoðan

**§8.** Roknskapur fyri stuðulsárið skal lúka treytirnar eftir § 21 ella § 22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.
*Stk. 2.* Grannskoðaður ársroknskapur fyri veittan stuðul skal vera latin Búnaðarstovuni áðrenn 1. februar árið eftir stuðulsveitingina.
*Stk. 3.* Hóast ásetingina í stk. 2 kann tann, sum hevur fingið stuðul, sum bara verður veittur eina ferð, og sum er minni enn 100.000 kr., í staðin fyri roknskap lata Búnaðarstovuni frágreiðing við neyðugum próvtilfari í seinasta lagi 1. februar árið eftir stuðulsveitingina.

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 60 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

**Gildiskoma**

**§ 9.** Hesar reglur koma í gildi beinanvegin.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 5. oktober 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Herálvur Joensen
aðalstjóri